Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Blokkurin

## *Oddagrein*

Mangt er í neyðini nýtt. Eitt uppskot var at nýta framtíðar oljuinntøkur sum pant í einari lánifígging av fullveldinum. Nú er tað seinasta, ið skal yvirtala føroysku veljarnar til at taka undir við fullveldisætlanini, at blokkurin verður burtur óansæð. Spurningurin er, hvussu sakligt tað er av landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum at siga hetta.

Fyrst segði samgongan, at blokkurin fór at halda fram sum nú í allar ævir, um føroyingar ikki tóku fullveldi, og tí spardu danskarir milliardir við at geva føroyingum fullveldi við eini skiftistíð uppá 15 ár. Nú er knappliga ikki talan um allar ævir, nú ljóðar á Høgna Hoydal sum um blokkurin verður burtur í morgin grundað á eitt útsagn frá Lykketoft.

Svart ella hvítt argumentatiónin heldur ikki. Sjálvsagt skal blokkurin minkast, um føroyingar gerast búskaparliga sjálvbjargnir innan ríkisfelagsskapin, men tað er ikki talan um at hann fellur burtur í einum. Blokkurin verður tikin upp til samráðingar við millumbilum grundaður á búskaparliga gongd. Hendan loysingarsamgongan gjørdi tað, at hon tryggjaði sær blokkin meðan hon sat, og ikki nokk við tí, samgongan syrgdi fyri, at blokkurin fylgdi prístalinum. Við øðrum orðum syrgdi loysingarsinnaða samgongan fyri, at blokkupphæddin hækkaði í hesum samgonguskeiðnum.

Blokkurin fellir ikki burtur um 4 ár innanfyri ríkisfelagsskapin, men hann heldur ivaleyst heldur ikki fram í allar ævir. Tað er tíbetur okkurt ímillum hesi bæði. Verðin er ikki altíð svørt ella hvít, viðhvørt er hon grá. Leggjast kann afturat, at um Høgni Hoydal veruliga trýr, at blokkurin fellir burtur í næstu framtíð, so mátti tað verið lagamanni bara at loyst við fýra ára skiftistíð. Bert tað, at samgongan ikki vil hettar vísir, at sjálvt samgongan hevur fult álit á, at blokkurin heldur fram tey næstu mongu árini.

Samgongan argumenterar sum um at alternativið til fullveldisætlanina er at koyra í núverandi spori í allar ævir. Eingin politiskur flokkur í Føroyum, heldur ikki Sambandsflokkurin, vil koyra í sama spori sum nú. Tað koma broytingar í okkara viðurskiftum við Danmark, men hesar broytingar verða ivaleyst, um seinastu veljarakanningar eru eftirfarandi, innanfyri ríkisfelagsskapin.

Vit føroyingar eiga at arbeiða fram ímóti búskaparligum sjálvbjargni, hetta eru allir flokkar á tingi samdir um uttan Tjóðveldisflokkurin, ið eftir øllum at døma heldur, at hetta ikki ber til uttan loysing. Vit føroyingar stýra sjálvir við ábyrgd gongdini og vónandi vilja framtíðar samgongur ikki gera sum hendan til dømis gjørdi í flóttarfólkamálinum, har man skákaði sær undan ábyrgd, tí man vildi vísa, at heimastýrislógin ikki er nøktandi.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Flytið gamla hospital enn einaferð

Tá ið vit sum børn plagdu at spæla niðri við Vestaruvág í Havn, var Færø Amts Hospital ella Gamla Hospitalið, sum vit róptu húsini, ikki eini hús, sum vit góvu okkum so nógv far um. Vit vistu, at hesi lágu hugnaligu húsini einaferð høvdu verið sjúkrahús. Nú vóru húsini íbúðarhús í einum serligum umhvørvi.

Gamla Hospital, Skipasmiðjan, Müllers pakkhús, Bacalao og kolasølan hjá Valdemar Lützen vóru tilhaldsstøð hjá okkum børnum.

Tíðin broytir býarmyndina. Gomul hús og bygningar mugu dvína fyri nýggjum verkætlanum, og nú var tíðin so komin til Gamla Hospital.

Fyrsta sjúkrahúsið yvirhøvur varð bygt á Argjum umleið 1550, tá ið Christian 3. var kongur í Danmark. Sjúkrahúsið á Argjum var fyrst og fremst bygt at herberga teimum, sum vóru smittað av spedalsku sjúkuni.

1826 vórðu stig tikin at byggja Færø Amts Hospital. Sjúkrahúsið á Argjum var ov langt frá Havnini og vandi var alla tíðina fyri, at einasi læknin kundi verða veðurfastur á onkrari oyggj. Tí var best at byggja nýtt sjúkrahús, so sjúklingarnir kundu viðgerast á sjúkrahúsi í Havn.

Tíðin fór eisini frá Gamla Hospitali. 1921 var grundarsteinurin lagdur til Drotning Aleksandrines Hospital, har føðideildin í dag heldur til.

1962 var grundarsteinurin lagdur til Landssjúkrahúsið, sum nøkur ár sienni varð tikið í nýtslu.

Tá ið Tórshavnar Skipasmiðja, sum átti Gamla



Hospital, ætlaði at beina húsini burtur, tí tey forðaðu fyri virkseminum hjá skipasmiðjuni, vaknaðu fólk knappliga. Gamla Hospital mátti fyri alt í verðini ikki burtur.

Úrslitið gjørdist, at Gamla Hospital varð flutt einar 50 metrar niðan um Müllers pakkhús, har tað eftir mínum tykki slett ikki hoyrir heima.

Tá ið eini hús ikki kunnu varðveitast á upprunaliga staðnum, so er líkamikið um húsini verða flutt 50 metrar ella 500 metrar.

Gamla Hospital eigur at flytast enn einaferð. Gamla Hospital eigur at flytast í Sandagerð beint niðanfyri Drotning Aleksandrines Hospital.

Her kundu húsini í heimligum umhvørvið verið gjørd til eitt savn og øll sjúkrahússøgan í Suðurstreymoy var savnað á einum stað.

Frá Landssjúkrahúsinum, Drotning Aleksandrines Hospital og Gamla Hospital hevur tú tá útsýnið út á Argir, har fyrsta sjúkrahúsið var bygt umleið 1550.

Gamla Hospital hoyrir slett ikki heima, har tað nú stendur.

**Vagnur Michelsen**

*Sól og summar á gøtusandi:*

# Hugnaløta fyri stór og smá

*Ponyríðing, framsýning, fjallarenning, togtogan, køkuuppboðssøla, undirhald, ellisakfør, kórsangur, røða, bál og konsert við Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen. Hetta er nakað av tí, ið verður á sandinum í Syðrugøtu leygardagin*



Viðrar, skipar Gøtu Menningarfelag leygardagin 24. juni fyri tí vælumtóktu hugnaløtuni við stórum báli og nógvum øðrum spennandi tiltøkum á sandinum í Syðrugøtu.

Byrjað verður longu kl. 14 við at børn sleppa at sita á rossabaki. Eisini verður fiskibrunnur og køku/mattombola.

Kl. 15.30 byrjar Fjallarenningin. Hetta er kapping, ið fyrstu ferð var roynd í fjør við góðum úrsliti. Kappast verður um at renna /ganga niðan á Støðlafjall og oman aftur upp á tíð. Tríggir teir skjótastu luttakararnir fáa steyp til ognar, og vinnarin fær eisini stórt og vakurt ferðasteyp. Byrjað verður á Gøtueiði, og málstrikan er á sjálvum sandinum í Syðrugøtu. Øll, ið hug hava, kunnu taka lut í kappingini og tekning fer fram á tlf. 441484 ella á 442026. Meðan runnið verður, verður stór framsýning á økinum við sandin av politi-, sløkkiliðs- og sjukrabilum. Eisini verður framsýning av ellisakfør-um á økinum við sandin.

Kl. 16.30 er togtogan millum ung, konur og menn úr Syðrugøtu og Norðragøtu á skránni. Her verður kappast um ferðasteyp.

Uppboðssølan av køkum byrjar kl. 17.30. Seldar verða flottar og vælsmakkandi køkur í øllum møguligum útgávum.

Eftir køkuuppboðssøluna verður ymiskt undirhald á skránni. Ongum nýtist helldur at ganga svangur á sandinum, tí umframt pylsur og sodavatn, verður eisini kaffi og køka at fáa.

Kl. 18.30 fer felagskórið Gøta/Leirvík at syngja og Tórbjørn Jacobsen, skipari á Glyvrum, ið hevur røtur í Gøtu, fer at halda røðu. Tórbjørn er kendur røðari, so helst fellur okkurt gullkorn á sandin leygardagin.

Kl. 19.00 verður kynt í tað stóra bálið á sandinum, og tá verður eisini felagssangur. Heitt verður í hesum sambandi á fólk um at hava grønu sangbók við.

Kl. 20 verður ókeypis konsert á sandinum, har teir báðir Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen í einar tveir tímar fara at framføra meira og minni kendar vísur og sangir. Á midnátt verður konsert/dansur í skúlagarðinum, har »Mr Jolly's Fluffy Toys« og »Pith« fara at spæla. Hesum táttinum standa tónleikafelagið GRÓT og Menningarfelagið fyri í felag. Opið verður í Menningarfelagnum, meðan dansur er.

Gøtu Menningarfelag væntar, at tað fara at koma eins nógv fólk sum undanfarin ár, tí hetta tiltakið er vorðið fastur táttur í summarhugnanum hjá smáum og stórum eysturoyingum og eisini nógvum fólkum aðrastaðni frá.

Óneyðugt er helst at nevna, at tað sjálvandi er ókeypis at koma á Gøtusand leygardagin.

So sjálvandi síggjast vit í Gøtu leygardagin!!!



# Meira pengar til umhvørvið

*Landsstýrið ætlar at biðja løgtingið um eina hægri játtan, at tryggja eftirlitið við dálkandi virkjum. Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum kann ikki liva við, at bert 10. hvørt virki heldur lógina*

Dánjal Højgaard

Lógin skal haldast. Tí skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava fleiri starvsfólk at umsita lógina.

Hetta sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum. Hann er als ikki nøgdur við, at 9 av 10 fyritøkum ikki lúka lógarkravið um umhvørvisgóðkenning.

### Ljós á eftirlit

Ljóskastarin er settur á eftirlitið við teimum serliga dálkandi virkjunum og fyritøkunum í Føroyum.

Sambært lógina skulu hesi virki hava eina sonevnda umhvørvisgóðkenning. Men Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ikki orku at tryggja lógarkravið.

Ein uppgerð frá Starvsstovuni vísir, at 325 fyritøkur og virki koma undir lógarkravið um umhvørvisgóðkenning. Men bert 10. hvørt hevur tað neyðugu góðkenningina.

Starvsstovan hevur í fleiri ár biðið um fáa meira pening jattaðan, so at hon kann halda lógina. Men uttan úrslit.

Nú er líkt til, at knúturin kanska loysnar.

### Trý fólk afturat

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Eyðun Elttør sigur, at umhvørvismálaráðharrin ikki kann liva við, at 9 av 10 virkjum ikki halda lógina.

-Nei, hetta er ikki nøktandi, sigur Eyðun Elttør, sum hugsar sær eina loysn í tveimum pørtum.

Í fyrra lagi skal umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiliga Starvsstovan, hava fleiri starvsfólk. Játtanin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2001 skal hækkast, sigur hann.

-Vit kundu sett okkum sum mál, at tað koma trý fólk afturat til umhvørvisgóðkenning. Higartil hevur bert eitt fólk verið til hetta endamálið, sigur hann.

Stóra arbeiðsbyrðan á umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovu ger, at deildin hevur verið noydd at raðfesta uppgávurnar sera strangt. Sostatt eru tað nógvar yrkisgreinar, sum ongantíð rættuliga eru slopnar framat.

Hetta vónar landsstýrismaðurin verður broytt.

-Fáa vit játtan til trý fólk afturat kundu fólkini eisini verið til vegleiðing, soleiðis at tey kundu verið virkjunum til hjálpar, sigur hann.

-Tá kundu fyritøkur, sum vilja hava síni umhvørvisviðurskifti í rættlag vent sær til umhvørvisdeildina og fing-ið hjálp hóast fyritøkan ikki arbeiðir innanfyri tað raðfesta økið.



Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum heldur, at fleiri fólk skulu setast, at hava umsjón við teimum dálkandi virkjunum í Føroyum

### Innaneftirlit

Eyðun Elttør sigur, at spurningurin um umhvørvisgóðkenning, verður tikin upp í sambandi við, at ein umhvørvispolitikkur skal orðast. Ein nevnd fer í næstum at orða ein slíka politikk.

Landsstýrismaðurin útilokar tískil ikki, at galdandi umhvørvisverndarlóg verður broytt, og at vit fáa eitt nýtt slag av umhvørvisgóðkenningum:

-Í dag er tað soleiðis, at vit hava eina umhvørvisgóðkenning, har myndugleikin ger meginpartin av arbeiðinum. Vil kundu heldur gingið hinvegin. Vit skuldu kanska havt eitt slag av góðkenning, har myndugleikin góðkennir sjálva umhvørvisskipanina, t.v.s. eitt slag av innaneftirliti á virkjunum, sigur hann.

-Hetta merkir, at virkið sjálvt ger eitt innaneftirlit, ið verður lagt fyri myndugleikarnar, sigur landsstýrismaðurin.

### Varin deildarleiðari

Leiðarin á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at trý fólk hevði verið eitt munagott framstig fyri eftirlitið við teimum dálkandi virkjunum.

-Hetta kundi gjørt, at vit høvdu fingið skipað arbeiðið á hesum øki, sigur Jákup Pauli Joensen, sum heldur, at verður einki gjørt gerst ikki annað enn at taka hendan partin av lógini av.

Tað hevði kortini verið ein „stór falitterklering" og eitt afturstig í mun til grannalondini, heldur Jákup Pauli Joensen.

Eftir at hava bíðað eftir eini størri játtað til økið í so mong ár, leypir leiðarin á umhvørvisdeildini ikki upp í loft av frøi.

-Lat okkum nú síggja, sigur Jákup Pauli Joensen.

# Málið fyri løgtingið

*Løgtingið má antin broyta lógina, ella játta peningin, sum skal til fyri at halda lógina um umhvørvisvernd. Tað sigur Marjus Dam, næstsformaður í trivnaðarnevnd, sum nú fer at at taka málið um vantandi eftirlitið við dálkandi virkjum upp í tinginum.*

Dánjal Højgaard



-Tað gevur onga meining, at samtykkja eina lóg, uttan samstundis at játta tann pening, ið skal til fyri at tryggja, at lógin verður hildin.

Hetta sigur Marjus Dam, næstformaður í trivnaðarnevndini hjá løgtinginum.

Tingmaðurin hjá sambandsflokkinum er illa við av teimum upplýsingum, sum í seinastuni eru komnar fram um føroyskar fyritøkur og umhvørvisvernd.

Hann sigur, at løgtingið als kann ikki liva við, at bert 10.hvør virki og fyritøka í Føroyum halda lógina um umhvørvisvernd. Og at stórar fyritøkur, sum t.d. Havsbrún í Fuglafirði, sleppa undan regluligum eftirliti.

Antin má lógin um umhvørvisvernd broytast, so at tað ber til at halda hana. Ella má Heilsufrøðiliga Starvsstovan fáa tann pening, ið skal til fyri at halda lógina.

Sambært Marjusi Dam, er tað blivið eitt afturvendandi fyribrigdi, at løgtingið ger lógir, uttan at játta neyðuga peningin fyrst.

Og Marjus Dam ætlar ikki at lata málið fara framvið borðinum. Hann sigur, at hann fer at seta landsstýrismanninum í umhvørvismálum fyrispurning í málinum.

-Vit mugu arbeiða fyri at fáa hesi viðurskiftini í rættlag, sigur tingmaðurin.


